Fylgiskjal 7

Armgarð Weihe

Fra: Felagið Fjølrit <post@fjoelrit.fo>
Sendt: 8. november 2022 11:06
Til: Mentamálaráðið
Emne: Hoyringarsvar frá Fjølrit til lógaruppskot um nýggja bókasavnslóg

Til Uttanríkis- og mentamálaráðið

Fjølrit takkar fyri møguleikan at viðmerkja uppskot til løgtingslóg um bókasøvn.

Yvirskipað tekur Fjølrit undir við uppskotinum og fegnast um, at bókasavnslógin loksins verður dagførd. Felagið hevur áður havt uppskotið til undanhoyringar, og vit síggja í nýggja uppskotinum, at nakrar av viðmerkingunum, vit tá komu við, eru tiknar til eftirtektar.

Fyri Fjølrit eru tað serliga viðurskifti viðvíkjandi upphavsrætti, sum hava áhuga. Ein spurningur, sum aftur og aftur er komin upp, tá ið vit hava viðgjørt uppskotið, er, hvussu bókasavnsgjaldið verður fatað í einum upphavsrættarligum sjónarhorni. Hesin spurningur hevur ávirkan á til dømis § 22, stk. 2, har tað nú verður ásett, at eftirlivandi hjúnafelagi ikki longur skal arva rættin til bókasavnsgjald.

Til Kapittul 7 um Bókasavnsgjaldið
Fyri Fjølrit er tað ongin ivi um, at bókasavnsgjaldið er viðurlag til rættindahavarar fyri, at bókasøvn kunnu hava til taks og læna út tilfar, sum greitt er fevnt av upphavsrætti. Í uppskotinum til nýggja bókasavnslóg er tað ógreitt, hvat slag av gjaldi, talan er um, og Fjølrit sær fyri sær, at hetta kann hava løgfrøðiligar avleiðingar, sum vit í løtuni ikki duga at gjøgnumskoða. Nakað, sum broytingin í § 22, stk. 2 er eitt dømi um.
Fjølrit mælir tí til, at greiða fæst á hesum spurningi, áðrenn lógin verður løgd fyri Løgtingið at taka støðu til. Í hesum sambandi eigur eisini at verða kannað, um bókasavnsgjald, eins og viðurlag fyri upphavsrætt í øðrum høpi, eigur at verða fevnt av arvalógini, soleiðis at ikki bara hjúnafelagi, men eisini eftirkomarar eiga at arva rættin til bókasavnsgjald.
Til broytingina í § 22, stk. 2 hevur Fjølrit eisini ta viðmerking, at tað ongastaðni verður grundgivið nøktandi fyri, hví rætturin hjá hjúnafelaga til bókasavnsgjaldið skal falla burtur. Vit hava hoyrt eina grundgeving, sum sigur, at so verða fleiri pengar til teir rættindahavarar, sum eru eftir í skipanini, men hetta er ikki ein haldgóð grundgeving, tí samlaða játtanin á fíggjarlógini til bókasavnsgjald er ikki ein fastfryst játtan, men tvørturímóti ein játtan, sum kann og eigur at verða ásettt eftir samlaðu upphæddini av viðurløgum í bókasavnsgjaldinum.

Til Kapittul 8 um Ljóðbókatænastu hevur Fjølrit hesar viðmerkingar
Í § 23, stk. 3 verður heimild givin Landsbókasavninum at framleiða ljóðbøkur o.a., treytað av, at avtala er fingin í lag við rættindahavara. Hesum tekur Fjølrit fult undir við, og vit vilja gera vart við, at rættindahavi kann vera bæði ein rithøvundur, eitt forlag ella annað, og at hetta eigur at verða nevnt í viðmerkingunum. Fjølrit mælir eisini til, at ein slík avtala skal innihalda eitt eingangsviðurlag til rættindahavaran/rættindahavararnar fyri rættin at framleiða og læna út ljóðbókina. Ein hóskandi upphædd kundi verið kr. 5.000 fyri hvørja útgávu.
Í § 24, stk. 2 verður útgreinað, at keyparar av ljóðbókum frá Ljóðbókatænastuni kunnu avdraga kostnaðin árliga, til framleiðslukostnaðurin er rindaður, tó í mesta lagi í 10 ár. Fjølrit tekur undir við hesum leisti, men heldur, at 10 ár er í longra lagi, og mælir til, at áraskeiðið verður sett til 3 ár, ella í mesta lagi 5 ár.

Vegna Fjølrit,

Arnbjørn Ó. Dalsgarð
Aðalskrivari / *Secretary general*

LM-055/2022

FJØLRIT
Faroese Copyright Society
Postsmogu 62
FO-110 Tórshavn

tel: +298 238600

http://fjoelrit.fo/

Fyrivarni: Er tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævið, vinaliga sig frá og sletta brævið